# Oddagrein

## LØGMAÐUR VEIT BEST

Herluf er væl skikkaður« til starvið sum aðalstjóri í Uttanríkisráðnum. Tað sigur Kaj Leo Johannesen, Føroya Løgmaður, hóast ein setanarnevnd sigur nakað annað og tí hevur mælt til, at Herálvur Joensen, sendimaður Føroya í Keypmannahavn, varð settur í starvið.

Tað eru fleiri viðurskifti landsstýrinum viðvíkjandi, sum tykjast rættiliga margháttlig í hesum døgum. Viðvíkjandi setanini av aðalstjóranum í uttanríkisráðnum gongur løgmaður, stuðlaður og vegleiddur av Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharra, beint ímóti innstillingini hjá meirilutanum í setanarbólkinum - og hann fylgir innstillingini hjá tveimum av starvsfólkunum í Uttanríkisráðnum – fólk, sum eru beinleiðis knýtt at Herlufi Sigvaldsyni og uttanríkisráðharranum. Her tykist valda ein gegnistrupulleiki, sum løgmaður og uttanríkisráðharrin eru farnir heldur lætt um.

Í síðstu viku vóru eisini fleiri órógvandi tíðindi. Eitt var, at Jørgen Niclasen slapp at keypa sær atgongd til tíðindi í Kringvarpi Føroya, og at hann gjørdi eina roynd eisini at keypa sær atgongd til tíðindi í Rás. Hetta at ein ráðharri setir síni fólk beinleiðis í samband við einstakar journalistar uttan um fjølmiðlaleiðslurnar er ein sera ódámligur framferðarháttur – ein framferðarháttur, sum Kringvarpið heldur ikki átti at staðið modell til.

Eitt annað mál var tíðindafundurin eftir ríkisfundin í Skagen, har løgmaður við óhepnum úttalilsum um stjórnarskipanaruppskotið og um hvalaveiðu setti sinnini í kók hjá sínum samstarvsfeløgum. Men teir fingu so løgmann at skera sína meining út í papp – so hon betur sampakkaði við meiningina hjá Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum – í einum nýggjum tíðindaskrivi.

Hvussu hesir tríggir floksformenn handla sínamillum er ilt at vita. Men so nógvar óhepnar støður upp á fáar dagar skapa ikki júst álit um landsins leiðslu



og landsins leiðarar. Heldur beint tvørturímóti.

Men vit hava ein stovn sum Løgtingsins Umboðsmann, sum av sínum eintingum kann taka mál upp. Tað hevði verið sera áhugavert at sæð, hvat hesin stovnur heldur um tær avgerðir og tær mannagongdir, sum eru nýttar í landsstýrinum seinastu tíðina.

Spurningurin er, um løgmaður veit best, ella um talan er um ganska almindiligan politiskan handilsskap – har menn við ymsum klemmum á hvørjum øðrum kunnu skalta og valta. Vónandi ikki, tí tað er mønustingurin hjá allari skipanini.

**So nógvar óhepnar støður skapa ikki júst álit**

## Hawaii Dream komið afturíaftur




Tann fyrr so vælkendi leskidrykkurin, Hawaii Dream, sum fekst frá Føroya Bjór líka síðani 1954, er nú aftur komin á marknaðin.

Í novembur 2007 varð avgjørt á Føroya Bjór bert at framleiða sodavatn við náturligum litevni. Tískil steðgaði øll framleiðslan av m.a. Sport, Peru, Citrón og Hawaii sodavatni.

Men fyri stuttum kom tann góða gamla Sport sodavatnin aftur á føroyska marknaðin. Smakkurin er tann sami sum fyrr, men hesaferð er sodavatnið uttan litevni.

Nú er Hawaii eisini framleitt í 0,5 ltr fløskum. Hawaii sodavatnið kom fyrstu ferð á føroyska marknaðin í 1954.

## Føroyskir ungdómar Yppa øksl

- YPP er sprottið burtur úr politiskari líkasælu, ráðaloysi og óskili, sum ger, at vit ikki vita, hvat vit skulu meina ella halda, siga fyrireikararnir av tiltakinum, sum verður í Vágsbotni fríggjadagin.

Fríggjakvøldið kl. 19 hittast líkasæl og ábyrgdarleys ung og yppa øksl saman. Aftrat YPPum verða tónleikur, røður og skemt.

- Ein keðilig ringrás av hjálparloysi, ábyrgdarloysi og líkasælu, sum bara ger meiri og meiri um seg. Tí kunnu vit bara yppa øksl, siga fyrireikararnir.

Á skránni verða røður frá millum øðrum Petur Pólson, Annlis Bjarkhamar, Ludvík Breckmann, Sjúrður Skaale, Sunnevu Háberg Eysturstein.

Av tónleiki verður 200, Lyon Hansen og Jens Marni Hansen.

*barbara@sosialurin.fo*



**Rósur til Eyðun og Javnstøðunevndina**

BJØRT SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 12



**Landsstýrið og korruptión**

JOHN JOHANNESEN
KJAK Á SÍÐU 13



## Niarn á Summar Festival

Kendi danski rapparin Niarn verður gestur hjá The Dreams á Summar Festivalinum.

Niarn byrjaði sína yrkisleið sum rappari í undirgrundsumhvørvinum í Aalborg og Keypmannahavn. Lívsførslan var ikki altíð tann besta, men við tíðini gjørdist hann alsamt meira seriøsur við sínum tónleiki.

Í 2005 kom fyrsta fløgan hjá honum út. Hon kallaðist Årgang '79, og hann fekk eina gullplátu fyri søluna av hesari útgávuni. Síðani hevur Niarn givið tvær fløgur afturat út, umframt at hann hevur verið samstarvað við onnur um einstakar sangir.

– Eg haldi, at eg sum rappari kann verða erligur. Eg eri ikki bangin fyri at vísa mínar ringu síður, og eg rappi ikki bara um, hvussu harður eg eri, sigur Niarn.

– Hóast eg kann tykjast harður, so eri eg bleytur og sárbarur innaní, og eg eri sera kensluríkur. Allir mínir sangir snúgva seg um mínar kenslur og meiningar, sigur hann.

Niarn er nú farin at samstarva við føroyska rockbólkin The Dreams á konsertum í Danmark, og tá The Dreams fara at spæla á Summar Festivalinum verður Niarn gestur á pallinum.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo
**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo
**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo
***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*